Sund er best egnaða staðið til útgerðarhavn

Sund er tað best egnaða økið í Føroyum, tá talan er um at veita service til eina møguliga oljuvinnu við Føroyar. Orsøkirnar eru fleiri

INGI SAMUELSEN

Tórshavnar Skipasmiðja og bretska fyritøkan ASCo Group eru til reiðar at fara undir at gera eina útgerðarhavn inni á Sundi.

Eitt føroyskt partafelag er stovnað, sum hevur gert leiguavtalu við Tórshavnar Kommunu, og á einum fundi í býráðssalinum í Havn í gár varð ætlanin lagd fram fyri tiðindafólki, politikarum og vinnulívsmonnum.

Poul Mohr stjóri á Tórshavnar Skipasmiðju gørdi beinanvegin greitt, at henda ætlan ikki skal siggjast sum ein krigsavbjóðing móti teirri ætlan, sum Páll Vang býráðsformaður á Tvøroyri og danska fyritøkan Danbor Service almanakunngørdu týsdagin.

– Satt at siga ætlaðu vit at halda hendu fundin í síðstu viku, men Leivur Hansen var upptikin av ørindum uttanlanda, segði Poul Mohr, og helt áfram.

– Vit hava arbeitt við hesi ætlan í yvir tvey ár, og vit trúgva upp hana, segði Poul Mohr.

Á fundinum greiddu bæði hann, Leivur Hansen og Donald Michie frá ASCo frá, at Sund var tað best egnaða staðið at leggja eina útgerðarhavn.

Millum nógv aðrar grundir vistu teir á, at Sund liggur tætt við høvuðsstaðin, har oljufyritøkurnar hava sínar høvuðsstøðir, har nærum øll onnur tænasta er frammanundan, og har fólkagrundarlagið og sostatt eisini vitanargrundarlagið er til staðar.

At skipasmiðjan leingi hevur arbeitt við ætlanini á Sundi kann m.a. siggjast í, at hon fyri árum síðani keypti stóra goymslubyggingin hjá Fiskaseluni á Sandvíkahjalla.

Just hesin 4.000 stóri goymslu- og skrivstovubyggningur er ein sentralur partur í ætlanini.

– Tað, at vit kunnu halda henda part av aktivitetinum so tætt við havnina á Sundi, er ein fyrmunur fyri Tórshavnar býi, sum sleppur undan nógvum trafikki, segði Donald Michie millum annað.

Aðrir fyrmunir eru, at Sund liggur miðskeiðis í landinum, at fólk úr øllum miðstaðarøkinum hava møguleikar at arbeiða á Sundi, at skið er lætt atkomiligt, at tað ikki órógvar verandi ferðaskipasambond og fiskivinnu, og so sjálvandi, at havnaanleggið liggur klárt har frammanundan.

– Vit hava útbygt økið á Sundi fyri 50 milliónir, men tað hevur ligið óbrukt í yvir 10 ár. Tá vit ætlaðu at gera eina útflutningsmiðstað har, settu landspolitikkarnir seg ímóti. Tað vóni eg ikki, at teir gera hesuferð, segði Leivur Hansen.

Hann segði, at ætlanin hjá ASCo Føroyum er í tráð við lógna og kjakið um kolvetni í løgtinginum.

– Ilagan er gørd, so her er eingin vandi fyri at endurtaka mistøk við at gera dýrar óneyðugar ilagur, vísti Leivur Hansen á.

Spurdur um hvi skipasmiðjan ikki leggur útgerðarhavnina á Skálafjørðinum, svaraði Poul Mohr.

– Fyrst av øllum, tí at tað sostatt ikki skulu gerast ilagur í havnaanlegg. Hinvegin er hendu ætlan so gomul, at vit ikki høvdu nakað at gera inni á Skála, tá hon varð lagd út í kortið, segði Poul Mohr.

Leivur Hansen býráðsformaður fegnaðist byarinnar vegna um ætlanina.

– Hetta skapar eitt nógv fólkini, sum ynskja at koma til Havnar.

Spurdur um hvat kommunan so ætlar at gera við eitt nú íbúðar- og ansingartarvin í høvuðsstaðnum, segði Leivur Hansen.

– Tað er okkara uppgáva sum kommuna at loysa hesar trupulleikarnar. Viðvíkjandi íbúðarbygging veit eg, at fleiri ætlanir eru í gongd.

Hann segði eisini um ansingarspurningin, men Poul Mohr var skjótur at svara, at pláss eisini er fyri einum barnagarði á Sundi, um tað gerst neyðugt.

Donald Michie, Poul Mohr og Leivur Hansen vænta sær nógv av nýggju útgerðarstøðini á Sundi. Sund er best egnaða havn til endamálið, eitt nú tí at hon liggur so nær við høvuðsstaðin Mynd: Kalmar

ASCo Group drúgvar royndir við at tæna oljuvinnuni

ASCo Group er størsta felag í Bretlandi innan logistikveitingar til oljuvinnuna. Felagið hevur fleiri útgerðarhavnir á bretska meginlandinum og í Noregi og tænir ein stóran part av oljuvinnuni í Norðsjónum og við Hetland

INGI SAMUELSEN

Nyggja felagið ASCo Føroyar fer at bjóða eitt samlað veitingartilboð til framtíðar olju- og gassleiting á Atlantsmótinum.

Nyggja føroyska felagið er undir stovnan, og ASCo Group og p/f Tórshavnar Skipasmiðja fara at eiga hvør sína helvt av partapeningínum.

Tað, sum ASCo fer at bjóða, er veitingar á kajkantinum, transithøll, varuhús og goymslutænastur. Eisini verður tyrlutænasta og tænastur í sambandi við manningarskift veitt umframt utgerðartænasta frá flotanum av utgerðarskipum hjá ASCo.

Útgerðarstøðirnar hjá ASCo í Aberdeen, Peterhead og Stavanger skulu virka sum høvuðsveitingarstøðir fyri flutningi av vørum og útgerð.

Tórshavnar Skipasmiðja fer at útvega tað, ið krevst, fyri at reka staðina við at nýta føroyska arbeiðsmegi, tænastur og fakkunnleika.

Tórshavnar Skipasmiðja er størsta privata fyritøka í Føroyum við skipasmiðjum í Havn og á Skála. Á Skálafjørðinum er møguleiki fyri at gera arbeiði á djupum vatni, sum er ein fyritreyt, tá talan er um umvælingar og viðlikahaldsarbeiði av borringum.

– Politikararnir siga, at fiskiskipaflotin skal minkast. Tí er neyðugt hjá eini fyritøku sum okkara at royna nyggjar leiðir. Vit eru vissir í, at framtíðin hjá skipasmiðjunum í Føroyum liggja í at veita tænastur til oljuvinnuna, og tað er tí, vit eru farnir undir hetta samarbeiði, segði Poul Mohr, stjóri á Tórshavnar Skipasmiðju, tá ætlanin var lagd fram í gár.

Í einum tiðindaskrivi sigur ovasti stjórin hjá ASCo plc., Colin Manderson, at hann fegnast um, at fyritøka hansara nú hevur kastað saman við leiðandi fyritøkuni í Føroyum, Tórshavnar Skipasmiðju.

– Vit fara at bjóða kundum okkara fyrimunirnar av royndunum hjá ASCo í Norðsjónum í einum nyggjum umráði, nú leitingarvirksemið flytur seg til havið kring Føroyar.

– Umframt at veita kundum okkara eitt høgt tænastustøði, fer p/f ASCo Føroyar at leggja seg upp at teimum strangastu trygdar- og umhverviskrøvunum, skrivar Colin Manderson.

ASCo Group flytir yvir 3 milliónir tons av ymiskum farmi til umleið 50 ymiskar frálanda installationir.

ASCo Group keypti í desember 1997 tvey dóttirfelag hjá John Wood Group. Harvið øktist talið av starvsfólkum til 640, og árligi umsetningurin veksur væntandi til 200 milliónir pund.

Í Stórabretlandi hevur ASCo útgerðarstøðir í Aberdeen, Immingham, Great Yarmouth, Liverpool Bay og í Peterhead umframt eina stað í Stavanger í Noregi.

ASCo er viðurkendur sum leiðandi á marknaðinum innan fyri útgerðartænastu og væl útbygt logistik-net til olju- og gassvinnuna.

Føroya Skulabókagrunnur hevur givið út heftini -Vit arbeiða við Nyggja Testamenti 1 og 2 eftir Elsu Birgittu Petersen. Johan Kjeld hevur teknað myndirnar.

Hesi bæði heftini eru ætlað teimum eldru flokkunum í fólkaskulanum sum iskoyti til undirvisingina í kristni.

Arbeitt verður evangeliunum og Apostlasøguni. Aftast í heftunum eru orðafrágreiðingar.

Fyrra heftið er 35 síður, tað seinna 32.



Føroya Skulabókagrunnur hevur givið út -Firvaldsbók- 1, 2 og 3. Gunnvá Dam hevur skrivað og lagt til rættis, og Olivur við Neyst hevur teknað.

Firvaldsbøkurnar eru stuttligar uppgávur til byrjanarundirvisingina í fólkaskulanum. Uppgávurnar eru gørdar soleiðis, at næmingarnir kunnu arbeiða sjálvstøðugt og sjálvir siggja, um uppgávurnar eru rætt loystar ella ikki.

Hvør firvaldsbók er um 30 síður.

Telduflokkurin liðugur

Telduøldin byrjar um tvey ár, og nýtslan av teldu økist fyri hvørt ár, sum gongur. Fyri tveimum árum síðan fór Handilsskúlin á Kambsdali undir eina umfatandi verkætlan við einum telduflokki. Nú er flokkurin liðugur, og úrslitið hevur vist seg

RUNAR REISTRUP

Fyri tveimum árum síðan byrjaði ein nýggj tíð á Handilsskulanum á Kambsdali. Eitt av nýggju HH flokkunum gørdist ein sokallaður -telduflokkur-, har allir næmingarnir bruktu farteldur í undirvisingini ístaðin fyri blýant og pappír.

Í gár fingu hesir næmingarnir so hógvuna, og nú hevur úrslitið vist seg.

Elsa María Holm Olsen, skulastjóri á Handilsskulanum á Kambsdali, sigur, at verkætlanin við telduflokkinum hevur verið vælevdnað. Sjálvsagt vóru byrjunartrupulleikar, tí tað er altið torfert at byrja okkurt heilt nýtt.

Og heilt nýtt er tað. Elsa María Holm Olsen sigur, at hon veit bara um ein annan handilsskula í øllum Norðurlondum, sum var eina skjótur at stovna telduflokk og Handilsskulin á Kambsdali. Hann liggur í Ishøj í Danmark.

– Eg meti, at vit eru tann handilsskúlin, sum er komin longst í Norðurlondum við at nýta teldur sum part av undirvisingini. Tað hevur í øllum førum vist seg at vera ógvuliga torfert at fáa ráðgeving aðrastaðni frá, tí tey kenna ikki til telduflokkar aðrastaðni, sigur hon.

Góðar møguleikar

Næmingarnir í telduflokkinum hava fingið nógv burturur, heldur skulastjórin á Handilsskúlanum á Kambsdali.

– Teir hava lært at brúka telduna til fulnar, og teir hava soleiðis lært at nýta eitt nútímans amboð, sum heilt vist verður framtíðin. Og tað fer at geva teimum góðar møguleikar seinni í lívinum, heldur hon.

At næmingarnir í telduflokkinum ikki standa aftan fyri hinar HH næmingarnar, sum í hesum dagum gera seg lidnar, hava teir vist við prøvtøkunum, har prøvtal teirra liggja fult á hædd við prøvtølini hjá hinum næmingunum.

Men just á prøvtøkuskúnum liggja teir størstu oloystu trupulleikarnir enn. Telduflokkurin skuldi upp í just somu skrivligu prøvtøkuuppgávunum sum hinir flokkarnir, tað vil siga við pappír og blýanti, og tað heldur skulastjórin ikki vera rætt.

– Telduflokkurin hevur lært nógv um at nýta teldu sum amboð. Næmingarnir er undirvistir í at nýta fornt, og teir bruka internetið sum undirvisingartilfar. Prøvtøkurnar eru ikki lagdar eftir øllum tí, sum næmingarnir hava lært um teldur, og vit have heldur ikki fingið uppgávusettini á diskli, soleiðis, at tey kunnu loysast á teldu. Tað má gerast okkurt við sum skjótast, sigur Elsa María Holm Olsen, skulastjóri.

Hetta er framtíðin

Tá telduflokkurin fyri tveimum árum síðan fyri fyrstu ferð varð stovnaður, var hetta ein royndur, og úrslitið skuldi nýtast til at kanna, um hetta var framtíðin ella ikki. Nú hevur úrslitið so vist seg, og Elsa María Holm Olsen er ikki í iva.

– Hetta er framtíðin. Tveir 1.HH flokkar eru í løtuni telduflokkar, og allir teir flokkarnir, tað vil siga við pappír og blýanti, og tað heldur skulastjórin ikki vera rætt.

– Telduflokkurin hevur lært nógv um at nýta teldu sum amboð. Næmingarnir er undirvistir í at nýta fornt, og teir bruka internetið sum undirvisingartilfar. Prøvtøkurnar eru ikki lagdar eftir øllum tí, sum næmingarnir hava lært um teldur, og vit have heldur ikki fingið uppgávusettini á diskli, soleiðis, at tey kunnu loysast á teldu. Tað má gerast okkurt við sum skjótast, sigur Elsa María Holm Olsen, skulastjóri.

Hetta er framtíðin

Tá telduflokkurin fyri tveimum árum síðan fyri fyrstu ferð varð stovnaður, var hetta ein royndur, og úrslitið skuldi nýtast til at kanna, um hetta var framtíðin ella ikki. Nú hevur úrslitið so vist seg, og Elsa María Holm Olsen er ikki í iva.

– Hetta er framtíðin. Tveir 1.HH flokkar eru í løtuni telduflokkar, og allir teir flokkar, sum verða tiknir upp næsta ár, vera telduflokkar. Vit have havt nógvar góðar diskusjónir um telduflokkin, og tað gongur rætta vegin at endurútbúgva læraararnar til at undirvísa telduflokkum.

Næmingarnir í fyrsta telduflokkinum í Føroyum nakrantíð fingu hugvurnar á hevdi í gár, hósdagin, og teir fáa prógvini handað sunnudagin 21. juni á Handilsskulanum á Kambsdali.

Telduflokkurin hevur lært nógv um at brúka telduna sum amboð Mynd: Kalmar

Elsa María Holm Olsen, skulastjóri á Handilsskulanum á Kambsdali

Oljustevna í Stavanger

Í fjør var framsýningin Offshore Europa hildin í Aberdeen. Fyri fyrstu ferð verða føroyingar við á norsku framsýningini ONS 98, sum verður í august

BEATE L. SAMUELSEN

Annaðhvørt ár verða stórar oljumessur hildnar her norðanfyri.

Býirnir, har stevnurnar verða hildnar uppá skift, eru Aberdeen, har stevnan gongur undir heitnum Offshore Europe, og í Stavanger, har hon eitur Offshore Northern Seas.

Í fjør var framsýningin í Skotlandi, so í ár, í dag unuum 25 til 28. august verður hon í Noreg aftur.

Vaksandi áhugi

Føroyskar fyritøkur, oljufyrisitingin og annars almennir myndugleikar, hava við góðum úrslitt tikið lut á seinastu framsýningunum av hesum slag í Aberdeen, men í summar er fyrstu ferð, at vit verða við á messuni í Stananger.

Orsøkin til, at føroyingar vera við á stevnuni í Stavanger, er, at áhugin er vaksandi Føroyum sum komandi olju- ella gassútvinningarøki. Tí er eisini áhugin hjá føroyskum fyritøkum at koma uppi frálandavinnuna.

Eisini ráðstevna

Fyri at ganga hesum ynskjum á møti, hava Menningarstovan, Oljufyrisitingin og Føroya Arbeiðarafelag saman teknað seg fyri einum bási á stevnuni ONS 98, ein stytting av navninum Offshore Northern Seas.

Fleiri fyritøkur hava longu boðað frá, at tær hava hug at vera við á føroyska básinum.

Í sambandi við framsýningina sístu í august verður ein ráðstevna við sera áhugaverdum innihaldi, verður upplýst av Menningarstovuni.